# Tilmæli frá Fiskidaganevndini
# til
# landsstýrismannin í fiskivinnumálum
# fyri
# fiskiárið 2017/2018

Tórshavn, 20. juni 2017

# 1. Inngangur

Fiskidaganevndin er sett við heimild í § 5 stk. 10 í løgtingslóg nr. 28 um vinnuligan fiskiskap frá 10. mars 1994, við seinni broytingum.

Uppgávan hjá Fiskidaganevndini er at lata landsstýrismanninum metingar um støðuna í botnfiskastovnunum og tilmæli um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiárið.

Fiskidaganevndin hevur í samband við tilmælið fyri fiskiárið 2017/2018 greinað hagtalstilfar, kunngerðir um friðing og aðrar ásetingar, sum ávirka fiskivinnuna. Fiskidaganevndin hevur eisini havt fundir við fiskifrøðingar, havfrøðing, fiskimenn og serkøn innan fiskiskap undir Føroyum.

Eins og undanfarin ár, hevur Fiskidaganevndin í samband við tilmælið latið gjørt kanning millum fiskimenn, sí hjáløgdu frágreiðing *"Samrøðukanning millum fiskimenn 2017"*. Stuttur samandráttur av samrøðukanningini er við í tilmælinum.

**Limir í nevndini eru:**
Hjalmar Hansen, formaður, Rúna Hjelm, næst-forkvinna, Dánjal í Skálum, Partrolarar; Bjarni Kass, Trolbátar; Sámal Debes, Meginfelag Útróðrarmanna; Hálvdan Gudmundsen, Felagið Línuskip, Sámal Poulsen, Føroya Fiskimannafelag.

Skrivari er Hertha Olsen.

# 2. Samandráttur og tilmæli

## 2.1. Samandráttur

Fiskidaganevndin umboðar serfrøðina, sum hevur sítt dagliga yrki á sjónum. Fiskimenn eru til staðar tá broytingar henda, eygleiða, síggja ábendingar og broytingar í náttúruni beinanvegin hetta hendir. Fiskimenn hava týdningarmikla vitan, sum er tíðandi fyri at fáa eina heildarmynd av støðuni hjá fiskastovnunum undir Føroyum.

Kanningin, sum Fiskidaganevndin hevur gjørt millum fiskimenn í 2017, eins og aðrar kanningar, sum eru blivnar gjørdar av saltinnihald, tøðum, hita, æti í sjónum og tilgongd av fiski benda greitt á, at náttúruumstøðurnar eru við okkum í løtuni.

Nógv bendir á, at viðrákið í náttúruumstøðunum, sum hevur verið seinastu 2-3 árini, hevur ført við sær, at fleiri av týðandi botnfiskastovnunum eru í vøkstri, og meta fiskimenn sum heild, at fiskurin er feitur, fiskastovnarnir eru betri fyri og tilgongdin er hampulig ella góð. Fiskimenn vísa á, at nógv meiri æti er at síggja nú enn undanfarin ár, og nebbasildin er í støðugum vøkstri 4. árið á rað; eftir at nebbasild mest sum ikki hevur verið at sæð árini 2011-2013.

Í kanningini verður eisini víst á, at 3. árið á rað, sær tað betri út hjá toskinum. Meiri er til av toski, og toskurin er feitur. Eisini verður mett, at tilgongdin er hampilig.

Hýsustovnurin er í støðugari framgongd, eftir at støðan hevur verið vánalig í fleiri ár. Hýsan er eins og toskurin sera feit, og tilgongdin er munandi betur í ár enn undanfarin ár, og meta fiskimenn støðuna hjá hýsuni at vera góða í mun til undanfarin ár.

Hvat viðvíkur upsanum, so meta fiskimenn at stovnurin er hampiliga væl fyri. Tað er nógvur smáur upsi at fáa, men eisini fitt av miðal stødd. Hinvegin eru tað eina mest snellubátar, sum fáa stóran upsa, og tí er ein spurningur, sum er verdur at kanna nærri: hvar fer tann stóri upsin? Í samband við gýtingina, so er ikki sama fiskarí, sum tað plagdi at verða. Tað tykist sum at upsin er meir spjaddur – og ikki so samlaður, sum hann plagdi at verða. Upsin er feitur, og meta fiskimenn at tilgongdin er batnandi 2. árið á rað.

Fyri flest onnur fiskasløg, so lata fiskimenn eisini hampiliga væl at støðuni hjá flestu øðrum fiskastovnum.

Sum heild lata fiskimenn væl at í samrøðukanningini fyri 2017. Allur fiskurin er sum heild sera feitur, nógv er at eta, og eru tískil góðar vónir til framhaldandi framgongd í komandi tíðum.

## 2.2. Tilmælið um fiskidagatal fyri fiskiárið 2017/2018

Fiskidagaskipanin er sum nevnt ein sokallað "effort skipan", sum er grundað á hvussu stórur innsatsurin er, hvussu nógv skip og bátar, og hvussu nógvir fiskidagar eru virknir í skipanini.

Gongdin seinastu árini hevur verið heilt greið:

- Talið av skipum og bátum, bæði talið av útskrivaðum loyvum, og tali av skipum og bátum, sum eru í vinnu, er minkað heilt nógv, við meiri enn 60% seinastu 9-10 árini.
- Í 2016/2017 eru 102 fiskiloyvir[1] útskrivaði til skip og bátar í bólkunum 2 til og við 5A. Av hesum hava 77 verið í vinnu hetta fiskiárið.
- Í 2007/2008 vóru útskrivaði 247 fiskiloyvir til bólkarnir 2 til og við 5A.
- Talið av tillutaðum fiskidøgum er skert við meiri enn 50% síðani fiskidagaskipanin kom. Knappir 29.000 fiskidagar eru tiknir úr skipanin síðani hon kom í gildið 1996/1997.
- Innsatsurin, royndin undir Føroyum, hetta fiskiárið er metlág, tá samanborið verður við t.d. 2000 og 2001, tá metnógvir fiskidagar vórðu brúktir.
- Stórar avmarkingar eru í hvar fiskiskip og -bátar kunnu royna, tí stórur partur av landgrunninum (innanfyri 100 favnar) er friðaður alt árið ella partar av árinum.

### 2.2.1 Sama fiskidagtal komandi fiskiár

Sum mangan fyrr ført fram, so er sjálv grundhugsanin í eini "effort-skipan", sum fiskidagaskipanin er, at ikki er neyðugt at stilla skipanina við at broyta fiskidagar ár um ár.

Tað er tó ein sannroynd, at fiskidagarnir eru munandi skerdir hesi gott 20 árini, vit hava havt fiskidagaskipan, og hevur flotin tí verið noyddur at tillaga seg hesar fortreytir. Henda tillaðing er týðulig við stóru minkingini av skipum og bátum, sum eru aktivir í fiskivinnuni, umframt at skipini hava tillagað seg ymisk veiðiøkir og ymisk fiskasløg. Tillaðingin hevur verið neyðug fyri at flotin so dánt hevur kunna hóra undan.

At náttúruviðurskiftini eru við okkum, gevur fiskimonnum mót uppá framtíðina, og at tað aftur ferð at loysa seg at dríva fiskarí eftir botnfiski við Føroyar. Tá flest allir skipabólkar hava tillaga seg broyttu fortreytirnar við skerjingini av fiskidøgum seinastu árini, síggja fiskimenn nú ljósari uppá framtíðina, har hvør fiskidagur kemur at kasta meira av sær og geva betur inntøku til skip og manning.

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, grundað á samrøðukanning o.a., at støðan hjá botnfiskastovnunum undir Føroyum verður ikki ávirkað skeiva vegin av verandi skipan.

Tikið verður eisini við í metingina, at náttúruviðurskiftini eru við okkum og fiskimenn lata væl at støðuni hjá botnfiskastovnunum.

Dagarnir, sum blivu tiknir úr skipanini 2016/2017, tí teir skuldu verða ein buffari, skulu inn aftur í skipanina, til teir bátar og skip, sum tikið bleiv frá[2].

Hesi viðurskifti gera, at nevndin mælir til, at samlaða fiskidagatalið komandi fiskiár verður óbroytt – t.v.s. 20.660 dagar.

### 2.2.2 Tillagingar av bólki 5A og 5B

Fiskidaganevndin hevur fyrr víst á, at neyðugt er at gera tillaðingar í bólki 5, og endurtekur í ár, sama tilmæli um bólk 5. Í verandi skipan eru vinnuliga rikin fiskifør í bólkunum 2 til og

---

[1] Útskrift frá Vørn 15.mars 2017

[2] Við hesi broyting fáa hesir bólkar hesar dagar: Bólkur 4a fær: 935 dagar, 4B fær 1440 dagar, 4T fær 1282 dagar og bólkur 3 fær 2208 dagar komandi fiskiár.

við 5A, meðan fiskiførini í bólki 5B í stóran mun eru frítíðarfiskarir (hóast nakrir vinnurekandi eru í hesum bólkinum).

Mælt verður til, at tað saman við vinnuni verður gjørd ein endurskoðan av skipanini í bólki 5A og 5B, soleiðis at skipanin í størri mun er vinna. Henda endurskoðan eigur at byggja á, at tryggja verður vinnuligum útróðrarbátum nøktandi dagatal. Um skerjingar skulu gerast í dagatalinum hjá bólki 5, so eigur henda skerjing einans at raka bólk 5B. Hjá einum sum hevur hug at liva at útróðri, eigur at bera til at byrja í bólki 5B og so arbeiða seg upp í bólk 5A og fáa dagarnar við sær í henda bólk.

### 2.2.3 Tillaging av 60%-regluni

Fiskidaganevndin hevur eisini fyrr víst á, at tað hevur stóran týdning at broyta 60% regluna, og endur tekur sama tilmæli í ár.

Ein partur av skipunum, sum eru virkin í Fiskidagaskipanini, hava brúkt ov fáar fiskidagar til at kunna avhenda teir áðrenn 1. juni, hetta sambært sokallaðu 60%-regluni.

Seinastu árini eru fleiri dømir um at skip og bátar, sum hava tørv á fiskidøgum, ikki fáa atgongd til fiskidagar, fyrr enn eftir 1. juni. Mælt verður til, at tillagingar verða gjørdar, soleiðis at fiskidagar ikki verða fastlæstir í skipanini innanfyri somu bólkar.

### 2.2.4 Royndarveiða á Føroya Banka

Føroya Banki hevur síðan 2008 verið friðaður fyri allari veiðu, undantikið nøkrum fiskidøgum til útróðrarbátar í 5A um summarið. Hóast friðing, so hava yvirlitstrolingar ikki víst stórvegis framgongd. Sostatt kann staðfestast, at tað at friða eitt økið í sjálvum sær ikki gevur nakað úrslit.

Fiskmenn yvast tó í, um støðan er so galin, sum kanningarnar hjá Havstovuni vísa. Tí verður mælt til, at 100 fiskidagar verða brúktir at gera royndarfiskiskap á Føroya Banka við vinnuliga riknum fiskiførum, við ymiskum reiðskapi, sum eru størri enn bátar í bólki 5. Hetta fyri at fáa eina fjølbroyttari mynd av støðuni á Føroya Banka. Fiskdaganevndin mælir eisini til at nærri kanningar verða gjørdar av vistfrøðiskipanin á Føroya Banka.

Samanumtikið mælir Fiskidaganevndin til, at tá friða verður eiga allir partar at fylgja sera væl við gongdini á friðaðum økjunum. Broytast økini? Kemur fiskurin aftur, so sum man roknar við?

# 3. Bakgrund

## 3.1. Færri skip, færri dagar, færri økir og minni roynd

Fiskidagaskipanin er ein sokallað effort skipan, tað vil siga ein skipan, sum er grundað á "innsatsin", tvs. grundað á hvussu nógv skip (stødd av skipum og reiðskapur), og hvussu nógvir fiskidagar eru virknir í skipanini. Í stuttum kann sigast: Jú fleiri skip til fiskiskap, jú størri er "innsatsurin", og jú færri skip, jú minni er "innsatsturin". Hetta er kjarnin í sjálvari Fiskidagaskipanini.

Ein annar týðandi partur av stýringsamboðunum í Fiskidagaskipanini er skipanin við avmarkingum í atgongd til fiskiskap á ymsu leiðunum á landgrunninum (innanfyri 100 favnar). Hendan avmarkingin er skipað við árligum friðingum í styttri og longri tíðarskeið. Friðingarnar eru bæði fyri ymiskum reiðskapi og ymiskum skipastøddum. Harumframt eru nógv økir eisini friðaði í samband við gýting, sokallaðu gýtingarfriðingarnar, í vártíðini.
Síðani Fiskidagaskipanin varð sett í gildið í 1996/97, eru sera nógvar og víttfevnandi broytingar og tillagingar farnar fram. Fiskiflotin á botnfiskaveiðu undir Føroyum er nógv broyttur (flotin er minkaður heilt nógv), samstundis sum talið av friðingum er nógv víðkað. Harumframt er fiskidagatalið meiri enn hálverað síðani skipanin varð sett í gildið.
Við øðrum orðum er innsatsurin, bæði tal av skipum og bátum og tal av døgum, minkaður nógv seinastu 20 árini, samstundis sum økini, sum fiskast kann á hava verið fyri munandi minking.

**77 skip og 25 bátar hava útskriva loyvir, og nógvir dagar tiknir frá vinnuni**
Fyri smáum 10 árum síðani, fiskiárið 2007/2008, vóru útskrivaði tilsamans 603 fiskiloyvir til fiskiskip og bátar (bólkarnar 2 til og við 5B), ið virkaðu undir Fiskidagaskipanini. Verður bólkur 5B, sum einamest fevnir um frítíðarfiskarar, tikin burturúr, so var talið 247 loyvir.

Hetta fiskiárið, 2016/2017, eru tað útskrivaði 543 fiskiloyvir til skip og bátar í bólkunum 2 til og við 5B. Verður bólkur 5B tikin burtúr, so eru tað hetta fiskiárið útskrivaði 102 fiskiloyvir til vinnuliga rikin fiskifør eftir botnfiski undir Føroyum. Talan er sostatt um minking á umleið 60% minking hjá vinnuliga riknum førum í 9-10 ár.

Av teimum 102 fiskiloyvunum, sum eru útskrivaði hetta fiskiárið, eru  77 fiskiloyvi til skip í bólki 2,3 og 4. Av hesum eru 68 í vinnu. 20 bátar í bólki 5A eru í vinnu.

Innsatsurin, tá umræður tal av skipum og bátum, er sostatt metlágur í mun til tá Fiskidagaskipanin kom í 1996/1997. Fiskiárið 2016/2017 var fiskidagatalið ásett til at verða 20.660 fiskidagar, ella knappar 29.000 fiskidagar færri enn í 1996/1997. Innsatsurin, tá umræður tal av fiskidøgum, er sostatt eisini metlágur í mun til tá Fiskidagaskipanin kom í 1996/1997.

**Nógvar friðingar**
Eitt er, at innsatsurin – tvs. talið av fiskiskipum og -bátum í vinnu, og talið av útskrivaðum fiskidøgum – er metlágur í mun til fyri 20 árum síðani, men harumframt eru tað hetta tíðarskeiðið eisini framdar stórar økingar í friðingunum á landgrunninum.

Friðingar:

- Umleið 50% av landgrunninum[3] uttanfyri 12 fjórðingar er friðaður fyri trolveiðu ein part av árinum ella alt árið.
- Ein stórur partur av landleiðini innanfyri 12 fjórðingar er friðað fyri húk partar av árinum.
- Øll landleiðin innanfyri 12 fjórðingar er friðað fyri trolveiðu alt árið, undantikið 3 mánaðir um summarið, tá trolbátar sleppa at royna á pørtum á landleiðini, tó ikki innanfyri 6 fjórðingar.
- Ein munandi partur av landleiðini er friðað fyri allari veiðu partar av árinum.
- Friðaðu leiðirnar eru øktar úr 10% av landgrunninum í 1990, til umleið 37,5% í 1994, til meiri enn 50% í 2016.
- Føroya Banki hevur verið friðaður fyri allari veiðu síðani 2008, við undantøku av nøkrum fáum fiskidøgum til útróðrarbátar í bólki 5A um summarið.

Tað skal fylgjast sera væl við, tá fiskiøkir verða friðaði, og kanning skal gerast, um endamálið verður rokkið við friðingini.

**Samanumtikið**
Nógvar broytingar eru farnar fram tey gott og væl 20 árini Fiskidagaskipanin hevur virkað. Stórar minkingar eru í innsatsinum (tal av skipum og bátum og tal av fiskidøgum), og av somu orsøk er royndin minkað heilt nógv. Harumframt eru møguleikarnir hjá skipum og bátum nógv avmarkaðir av friðaðum økjum.

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at støðan hjá botnfiskastovnunum undir Føroyum verður ikki ávirkað skeiva vegin av verandi skipan.

## 3.2. Viðrák í náttúruumstøðunum

Fiskidaganevndin hevur síðan 2011 gjørt samrøðukanning við fiskimenn, sum hava sítt dagliga yrki umborð á fiskiskipum og -bátum, ið fiska botnfisk og onnur fiskasløg undir Føroyum.

Fiskidaganevndin heldur ikki, at verðandi roynd undir Føroyum, hevur avgerðandi týdning fyri støðuna hjá stovunum, men heldur eru tað náttúruviðurskiftini, ið eru avgerandi fyri hvussu fiskastovnarnir undir Føroyum eru fyri. Samrøðukanningin í ár, eins og undan farin ár staðfestir hesa gongd, sum í stuttum kann lýsast við: gróðurin er góður, nógv er til av æti, so fiskastovnarnir eru við at koma fyri seg.

Í kanningunum í 2015, 2016 og nú í 2017 verður sum heild víst á, at náttúruumstøðurnar er broyttar til tað betra: Tað er eitt viðrák í náttúruviðurskiftunum (sí eisini hjáløgdu "Samrøðukanning millum fiskimenn 2017"). Nógv æti er í sjónum, toskurin stendur at bresta av nebbasild, allur fiskur er væl í holdum, og svartfuglur er at síggja, sum tað ikki hevur verið í fleiri ár.

Fiskidaganevndin er av tí fatan, at tað er ov einfalt at knýta roynd og støðuna hjá fiskastovnunum beinleiðis saman. Verðuleikin er munandi meira samansettur. Eru

[3] Innanfyri umleið 100 favna dýpi.

náttúruviðurskiftini ímóti, so kunnu fiskastovnar minkað, hóast als ongin fiskiskapur er. Øvugt kunnu fiskastovnar veksa skjótt, um náttúruviðurskiftini eru við, eisini um veiðutrýstið er stórt. Fiskidaganevndin tekur undir við havfrøðinginum Hjálmar Hátún, tá hann sigur: *"Broytingar í umhvørvinum hava stóra ávirkan á okkara vistskipan, og tað sær út til, at hesi seinastu árini hava (náttúruviðurskiftini) verði ímóti okkum"*. (Framløga fyri Fiskidaganevndini 15. mai 2017).

Vistskipanin, har saltinnihaldi, sjóhiti, tøðevni og reyðæti á okkara leiðum verða avgerðandi ávirka av subpolara meldrinum, ið kemur suður gjøgnum rennuna millum Grønland og Kanada/New Foundland. Hesi viðurskifti eiga at verða tikin við í metingar av fiskastovnum og livilíkindunum hjá fiski í føroyskum sjóøki.

Granskingin hjá havfrøðinginum og gróðurkanningarnar hjá Havstovuni benda á sama borð, sum kanningin, ið Fiskidaganevndin hevur gjørt millum fiskimenn: at náttúran er við okkum í løtuni, at ábendingar eru um, at tað hevur gingið rætta vegin seinastu 2-3 árini. Toskur, hýsa og upsi eru væl fyri, og tilgongdin sær út til at verða hampilig ella góð.

## 3.3. Ein misskiljing um "luft"!

Ein afturvendandi partur av kjakinum um fiskidagar og Fiskidagaskipanina er um "luft í skipanini". Í stóran mun er talan um misskiljing av skipanini, tá víst verður til, at "luft er í skipanini", vísandi á at nógvir óbrúktir dagar eru í skipanini.
Fiskidagaskipanin er samansett soleiðis, at skipanin eggjar ávísum skipabólkum til roynd á ytru leið, og verður sostatt eggjað til ávísa verju av toska- og hýsustovnunum á innaru leið. Skipanin eggjar eisini til eitt skifti í reiðskapi frá línu til snellu.
Fyri bólkarnir 2, 3, 4A, 4B og 4T telja fiskidagar á ytri leið 3:1. Somu viðurskifti eru galdandi fyri skifti av reiðskapi frá línu til snellu hjá bólki 4A og 4B, har fiskidagarnir telja 2:1.
Við øðrum orðum skal til dømis eitt línuskip í bólki 3, ið roynir eftir longu, brosmu og svartkalva á ytri leið, fiska 3 dagar fyri at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini. Somuleiðis skal ein útróðrarbátur í bólki 4A á snelluveiðu fiska í 2 dagar, fyri at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini.

Umframt nevndu skipanir, so hava havarí, árligt viðlíkahald, vánaligur fiskiskapur, konkurs, vánaligt veður og streymviðurskifti, ósemjur á arbeiðsmarknaðinum o.a. ávirkan á talið av brúktum og óbrúktum fiskidøgum i einum fiskiári.
Seinnu árini hava línuskipini tillagað seg umstøðurnar, sum eru, og fiska ein stóran part av árinum aðrastaðni enn undir Føroyum. Ein part av árinum fiska línuskip føroysku kvotuna undir Íslandi ella við Flemish Cap, og fiska eisini við Eysturgrønland (í samstarvi við grønlendsk reiðarí), meðan skipini ein annan part av árinum fiska undir Føroyum, á innaru- og ytru leið, tó nógv av veiðuni hevur verið á ytru leið.

Línuskipini eru eitt dømi um, at flotin hevur tillagað seg støðuna, sum er í løtuni, og er farin at royna aðrar leiðir og fiskar onnur fiskasløg í mun til fyrr, tá línuskipini einamest royndu inni á landgrunninum eftir toski og hýsu. Hetta eru eisini millum orsøkirnar til at minni av toski og hýsu verður fiskað undir Føroyum.
Leggjast kann afturat, at teir fiskidagar, sum ikki verða brúktir á innaru leið, ella undir Føroyum yvirhøvur, í einum fiskiári, í sær sjálvum er "ein friðing" av landgrunninum.

## 3.4. Kanning millum fiskimenn

Sjeynda árið á rað hevur Fiskidaganevndin latið gjørt samrøðukanning við fiskimenn, sum hava sítt dagliga yrki umborð á fiskiskipum og -bátum, sum virka innan Fiskidagaskipanina og fiska botnfisk og onnur fiskasløg undir Føroyum.

Í samrøðukanningini eru svarmøguleikarnir: góð, hampilig, ring og annað. Úttalilsini í samrøðukanningini og okkara frágreiðing byggja tí á hesa flokking.

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at tað hevur alstóran týdning, at ráðgevingin til landsstýrismannin eisini fevnir um at fiskimenn, sum hava dagliga yrki á sjónum sleppa til orðanna, og siga sína hugsan um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum og náttúruviðurskiftunum í sjónum. Hesir fiskimenn eru eftir áratíggjur av persónligum royndum og eygleiðingum, styrkt við royndum og eygleiðingum, sum onnur hava borið víðari til tey, vorðin serfrøðingar á teirra økið. - Og hava fiskimennirnir av somu orsøk sterkt grundarlag til at siga nakað um, hvussu støðan er hjá botnfiskasløgunum, og eisini um hvussu náttúruviðurskiftini eru.

# 4. Støðulýsing

## 4.1. Kanning millum fiskimenn 2017

Samrøðukanningin er liður í arbeiðinum hjá Fiskidaganevndini at lata tilmælið til landstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna hjá botnfiskastovnunum, um fiskidagar og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár.

Kanningin og frágreiðingin er gjørd eftir sama leisti ár um ár, soleiðis at úrslitini kunnu samanberast yvir áramál.

**Ymiskar tilgongdir við sama endamáli**

Samrøðukanningin við fiskimenn er grundað á tilgongd, har fiskimenn sum serfrøðingar á sínum øki sleppa at seta orð á, hvussu tey uppliva støðuna hjá fiskastovnunum og í náttúruni.

Samrøðukanningin hevur aðra tilgongd enn t.d. kanningar hjá fiskifrøðingum, sum eru grundaðar á eitt nú yvirlitstrolingar á ymiskum tíðum av árinum, við uppteljingum av fiski og øðrum úrslitum av yvirlitstrolingum.

Men hóast tvær ymiskar vísindaligar tilgongdir, so hava báðar til endamáls at royna at greina og meta um, hvussu støðan hjá fiskastovnunum er, og hvussu náttúruviðurskiftini eru í broyting og ávirka fiskasløgini. Báðar tilgongdir hava til endamáls at styrkja vitanargrundarlagið um føroysku fiskastovnarnar og broytingarnar í náttúruni. Ein tilgongd er ikki rættari enn onnur, hóast kjakið í Føroyum leggur upp til "at velja síðu". Heldur eiga úrslitini frá báðum sløgum av kanningum at verða brúktar í felag og í uppbyggjandi kjaki í samband við, at vit royna at styrkja vitanargrundarlagið undir skipanini av fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum.

**Viðrák í náttúruviðurskiftunum**

Kanningin í ár staðfestir eitt viðrák, sum kanningarnar seinastu árini hava givið ábendingar um, at ein týðilig broyting í náttúruviðurskiftunum er í vantu. Nærum øll í luttóku í kanningini í ár siga, at støðan við æti er góð ella hampulig og at øll fiskasløg er feit. Hetta er ein týðilig broyting í mun til árini frammaundan.

Fram til og við 2014, hava fiskimenn í samrøðunum víst á, at náttúruviðurskiftini eru vánalig, onki æti hevur verið at sæð, og ongin nebbasild, men seinastu trý árini er støðan broytt. Bæði 2015 og 2016 var tað ein heilt stórur partur av teimum, sum luttóku í kanningini, sum vístu á, at støðan viðv. æti er góð ella hampilig. Í 2017 eru tað 75% sum vísa á, at støðan er góð.

Í mun til árini 2011 til 2014, so er tað bert onkur einstakur, sum letur illa at náttúru-viðurskifunum.

**Góð útlit fyri toskinum**

Fiskimenn hava seinastu trý árini latið hampiliga væl at støðuni hjá toskinum. Í ár siga 97% av teimum, sum luttaka í kanningini, at støðan er góð ella hampulig í mun til undanfarin ár, meðan eingin sigur støðuna verða ringa.

Í 2011 lótu fiskimenn hampiliga væl at støðuni hjá toskastovninum. Hampilig tilgongd var í væntu, men hendan støðan broyttist heilt í 2012 og 2013. Høvuðsorsøkin var, at náttúruumstøðurnar ikki vóru við, m.a. var ov lítið av føði hjá toskinum.

Tey seinastu 3 árini er í samrøðukanningunum víst á, at støðan hjá toskinum er vorðin betri og betri. Náttúruviðurskiftini tykjast eisini at broytast til tað betra, tí hesi seinastu trý árini hava fiskimenn latið sera væl at støðuni við æti, og ikki minst viðv. nebbasild. Toskurin er feitur og tilgongdin er hampulig ella góð.

Hesi viðurskifti gera, at fiskimenn í 2017 meta støðuna hjá toskinum verða góða ella hampiliga í mun til undanfarin ár.

**Hýsustovnurin í stórari framgongd**

Tendensurin seinastu trý til fýra árini hevur verið rættiliga greiður: Tað eru alsamt fleiri, sum meta støðuna hjá hýsuni verða betri og betri, fyri ikki at siga góða. Í 2017 siga øll støðuna verða hampiliga ella góða. Í ár er tað eingin, sum sigur støðuna verða ringa.

Spurd um hvussu støðan hjá hýsuni er í mun til undanfarin ár, eru tað nærum øll (93%) av teimum, sum luttóku í kanningini, sum siga, at støðan er hampilig ella góð. 53% siga støðuna verða betri enn undanfarin ár, 40% siga støðuna verða hampiliga í mun til undanfarin ár, meðan eingin sigur støðuna verða ringa í mun til undanfarin ár.

Hýsan er feit, og mett verður av teimum flestu, at tilgongdin er góð í mun til undanfarin ár.

**Betri útlit fyri upsastovnin**

Hóast upsin er feitur, og fiskmenn vísa á, at tilgongdin hevur verið góð seinasta tvey árini, so eru teir, sum hava luttikið í kanningini, varnir í metingini um støðuna hjá upsanum í mun til undanfarin ár. Felags fyri so at siga øll árini kanningin er gjørd er, at um 60% á hvørjum ári hava sagt at støðan er hampulig. Ein týðulig broyting í ár er tó, at 20% siga støðuna verða góða, meðan tað einans vóru 5% í 2016, sum søgdu støðuna verða góða.

Fiskimenn undra seg tó yvir, hví so lítið er at fáa av stórum upsa. Snellubátarnir hava fingið nakað av stórum upsa, men ikki í tann mun kanningar av tilgongd hava víst. Kanningar eiga at verða gjørdar í samstarvi millum vinnuna og Havstovuna, m.a. við ymiskum reiðskapi og á ymiskum leiðum, eisini leiðum, sum annars eru friðaðar. Hetta er fyri at finna út av, hvar tann stóri upsin er, og/ella um upsin er í føroyskum sjógvi.

Samanumtikið er tó greitt at fiskimenn, sum luttakað í kanningini sum heild siga støðuna verða munandi betri í ár, serliga í mun til seinastu 2-3 árini.

## 4.2. Veiðuorkan minkar framhaldandi

Í 2016/2017 eru útskrivaði 102 fiskiloyvir til skip og bátar í bólkunum 2 til og við 5A. Av hesum eru 88 skip og bátar í vinnu.

**Talva 1. Útskrivaði veiðuloyvir/fiskiloyvir**

| Bólkur<br>Ár | 1<br>Tal | 2<br>Tal | 3<br>Tal | 4A<br>tal | 4B<br>tal | 4 T<br>Tal | 5A<br>Tal | 5B<br>Tal | Tils. uttan blk. 5 | Tils. við blk. 5A. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1998-99** | 13* | 32 | 20 | 51 | 45 | | | | 161 | |
| **1999-00** | 13* | 33 | 19 | 53 | 45 | | | | 163 | |
| **2000-01** | 13* | 32 | 19 | 51 | 42 | | | | 157 | |
| **2001-02** | 13* | 32 | 19 | 50 | 44 | | | | 158 | |
| **2002-03** | 13* | 31 | 19 | 53 | 40 | | | | 156 | |
| **2003-04** | 13* | 30 | 19 | 38 | 44 | | | | 144 | |
| **2004-05** | 13* | 31 | 19 | 32 | 48 | | | | 143 | |
| **2005-06** | 13* | 30 | 25 | 24 | 21 | 16 | | | 129 | |
| **2006-07** | 13* | 24 | 28 | 24 | 22 | 17 | | | 128 | |
| **2007-08** | 13* | 28 | 25 | 20 | 21 | 16 | 124 | 356 | 123 | 247 |
| **2008-09** | 13* | 28 | 24 | 17 | 19 | 14 | 108 | 301 | 115 | 222 |
| **2009-10** | 13* | 26 | 23 | 16 | 20 | 11 | 68 | 631 | 109 | 176 |
| **2010-11** | 10 | 26 | 20 | 16 | 17 | 10 | 74 | 633 | 99 | 173 |
| **2011-12** | 11 | 26 | 20 | 16 | 17 | 10 | 43 | 594 | 100 | 143 |
| **2012-13** | 11 | 24 | 18 | 10 | 16 | 9 | 39 | 493 | 88 | 127 |
| **2013-14** | 10 | 26 | 16 | 12 | 13 | 9 | 25 | 468 | 86 | 111 |
| **2014-15** | | 35 | 16 | 9 | 10 | 8 | 31 | 289 | 78 | 109 |
| **2015-16** | | 35 | 18 | 9 | 13 | 7 | 20 | 280 | 82 | 102 |
| **2016-17** | | 33 | 18 | 9 | 10 | 7 | 25 | 441 | 77 | 102 |

*Útskrivaði loyvir pr. 13.mars 2017 (Kelda: VØRN)*

**Viðm. Bólkur 1 kom ikki uppí fiskidagaskipanina fyrr enn í 2011, tá bólkur 1 varð lagdur saman við bólki 2. Áðrenn hetta vóru tað 13 lemmatrolarar/djúpvatnstrolarar í bólki 1.*

*NB! Útskrivaði loyvir merkir ikki neyvturviliga vinnuliga virkin loyvir.*

**Talva 2. Skip í vinnu og útskriva loyvir**

| Bólkur | 2 | 3 | 4A | 4B | 4T | 5A | Loyvir í vinnu blk. 2- 5A | Útskrivaði loyvir blk. 2- 5A |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skip í vinnu** | 33 | 14 | 5 | 9 | 7 | 20 | 88 | 102 |

Síðan 2007/2008 er talið av útskrivaðum fiskiloyvum í Fiskidagaskipanini, bólkarnir 2 til og við 5A, minkað úr 247 niður í 102 útskrivaði loyvir fiskiárið 2016/2017. Hetta seinasta árið er sostatt fyrsta árið, at talið av útskrivaðum fiskloyvum ikki er minkað. Talið av útskrivaðum loyvum fyri bólkarnar 2,3 og 4 er sostatt minkað við útvið 60% seinastu umleið 10 árini. Av teimum 102 útskrivaðu fiskiloyvunum, hava 88 verið í vinnu í tíðarskeiðinum 1. sept. 2016 – 31. mai 2017, ein øking við 16 í mun til fiskiárið fyri.

**Talva 3. Tillutaðir fiskidagar**

| Bólkur | 1 | 2 | 3 | 4 A | 4 B | 4 D | 4 T | 5 | Dagar tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1996/1997** | | 8.225 | 3.040 | 5.600 | 3.410 | 1.650 | | 27.000 | 49.585 |
| **1997/1998** | | 7.199 | 2.660 | 4.696 | 4.632 | | | 23.625 | 43.389 |
| **1998/1999** | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 41.219 |
| **1999/2000** | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 41.219 |
| **2000/2001** | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 41.219 |
| **2001/2002** | | 6.839 | 2.527 | 4.461 | 4.400 | | | 22.444 | 40.671 |
| **2002/2003** | | 6.771 | 2.502 | 4.416 | 4.356 | | | 22.220 | 40.265 |
| **2003/2004** | | 6.636 | 2.452 | 4.328 | 4.269 | | | 21.776 | 39.461 |
| **2004/2005** | | 6.536 | 2.415 | 4.263 | 4.205 | | | 21.449 | 38.868 |
| **2005/2006** | | 5.752 | 3.578 | 1.770 | 2.067 | | 1.766 | 21.235 | 36.168 |
| **2006/2007** | | 5.752 | 3.471 | 1.717 | 2.005 | | 1.713 | 20.598 | 35.256 |
| **2007/2008** | | 5.637 | 3.402 | 1.683 | 1.965 | | 1.679 | 20.186 | 34.552 |
| **2008/2009** | | 5.073 | 3.062 | 1.515 | 1.769 | | 1.511 | 18.167 | 31.097 |
| **2008/2009** | 3.640[1] | 4.638 | 3.095 | 1.393 | 1.848 | | 1.621 | 18.167 | 30.762 |
| **2009/2010** | 3.640[1] | 4.406 | 2.940 | 1.323 | 1.756 | | 1.540 | 17.259 | 29.224 |
| **2010/2011** | 2.600[1] | 4.274 | 2.852 | 1.323 | 1.756 | | 1.540 | 13.259 | 25.004 |
| **2011/2012** | 1.700 | 4.657 | 2.657 | 1.058 | 1.405 | | 1.386 | 10.607 | 23.300 |
| **2012/2013** | 1.530 | 4.626 | 2.567 | 1.011 | 1.533 | | 1.386 | 10.607 | 23.260 |
| **2013/2014** | 1.530 | 4.441 | 2.387 | 1.011 | 1.533 | | 1.386 | 9.865 | 22.153 |
| **2014/2015** | 1.530 | 4.455 | 2.387 | 1.029 | 1.530 | | 1.386 | 9.865 | 22.182 |
| **2015/2016** | 1.530 | 4.455 | 2.387 | 1.029 | 1.530 | | 1.386 | 9.865 | 22.182 |
| **2016/2017** | 1.530 | 4.386 | 2.208 | 935 | 1.440 | | 1.282 | 8.879 | 20.660[2] |

*Kelda: Fiskimálaráðið, JM*

*1) Í bólki 1, lemmatrolarar, vóru í 2009/2010 13 loyvir, sum fiskaðu umleið 280 dagar í miðal um árið. Bólkur 1 kom ikki uppí fiskidagaskipanina fyrr enn í 2011, tá bólkur 1 varð lagdur saman við bólki 2.*

*2) Við løgtingslóg nr. 82 frá 17. august 2016, vóru 179 dagar hjá bólki 3, 76 dagar hjá bólki 4A, 117 dagar hjá bólki 4B og 104 dagar hjá bólki 4T, lagdir afturat tillutaðu døgunum. Hesir dagar kundu eftir 1. desember útlutast til skip og bátar, sum høvdu brúkt allar sínar tillutaðu dagar. Hesir 476 dagarnir (sonevndur buffari) eru innroknaðir í 20.660 fiskidagar fyri fiskiárið 2016/17.*




*Mynd 1. Fiskidagatal í 1996/1997 og 2016/2017 fyri ávísar bólkar*

Fiskidagatalið er skorið úr 49.585 døgum í 1997 niður í 20.660 fiskidagar fiskiárið 2016/17, ein skerjing á meiri enn 58%. Síðan 2008 er fiskidagatalið skorið við umleið 10.400 døgum, ein skerjing á meir enn 1/3.

Bólkur 1, lemmatrolarar, var upprunaliga ikki partur av Fiskidagaskipanini, men gjørdist partur av skipanin í 2010, tá hann varð lagdur saman við bólki 2. Talið av fiskidøgum hjá bólki 2 (samanlagdur við bólk 1) er minkað úr 11.735 døgum niður í 5.916 dagar, ein niðurskurður uppá 50%.

Veiðuhagtølini er gjørd upp fyri 12 mánaðar tíðarskeiðið frá 1. mai til 30. apríl.




*Mynd 2: Veiðan eftir toski, hýsu og upsa seinastu 10 árini og tali av fiskiloyvum*

**Talva 4. Samlað fiskiveiða í føroyskum sjóøki 1. mai – 30. apríl, árini 2007-2017**

| | **2007/08** | **2008/09** | **2009/10** | **2010/11** | **2011/12** | **2012/13** | **2013/14** | **2014/15** | **2015/16** | **2016/2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur** | 11.784 | 9.400 | 10.587 | 12.787 | 10.126 | 6.229 | 5.286 | 6.190 | 8.175 | 5.663 |
| **Hýsa** | 9.136 | 4.995 | 4.673 | 3.650 | 2.879 | 2.590 | 2.390 | 2.404 | 3.084 | 2.561 |
| **Upsi** | 53.114 | 53.182 | 48.834 | 31.813 | 29.180 | 28.071 | 23.189 | 19.231 | 23.184 | 23.765 |
| **Longa** | 2.940 | 3.667 | 3.536 | 4.122 | 4.566 | 4.345 | 3.572 | 4.701 | 4.343 | 3.591 |
| **Brosma** | 2.171 | 2.956 | 2.386 | 2.997 | 3.160 | 2.465 | 1.097 | 1.385 | 1.369 | 1.128 |
| **Kongafiskur** | 1.810 | 1.075 | 1.687 | 1.220 | 907 | 722 | 698 | 632 | 740 | 1.649 |
| **Svartkalvi** | 1.686 | 2.250 | 1.797 | 952 | 2.005 | 2.493 | 2.517 | 3.339 | 3.087 | 4.494 |
| **Havtaska** | 2.722 | 1.508 | 1.820 | 2.134 | 1.698 | 689 | 545 | 511 | 586 | 776 |
| **Stinglaksur** | 725 | 878 | 952 | 713 | 385 | 185 | 714 | 587 | 917 | 543 |
| **Gulllaksur** | 14.597 | 21.269 | 18.838 | 18.655 | 19.030 | 11.877 | 13.752 | 12.042 | 13.002 | 13.482 |
| **Makrelur** | 0 | 1 | 6 | 5.717 | 17.160 | 18.321 | 25.198 | 36.462 | 21.935 | 61.566 |
| **Sild** | | | | 803 | 2.994 | 3.698 | 14.999 | 2.506 | 1.200 | 50.470 |
| **Annað** | 6.196 | 4.372 | 3.901 | 3.853 | 9.657 | 9.486 | 8.020 | 6.895 | 5.617 | 693 |
| **Tils.** | **106.881** | **105.553** | **99.017** | **89.416** | **103.746** | **91.171** | **101.977** | **96.886** | **87.239** | **170.380** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 5. Toskur støddarbýttur, 1. mai - 30. apríl, árini 2007-2017 (í tonsum)**

| | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/2015 | 2015/2016 | 2016/2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 51 | 91 | 79 | 51 | 136 | 252 | 119 | 89 | 148 | 207 |
| **Toskur 1** | 847 | 782 | 627 | 640 | 953 | 717 | 486 | 624 | 609 | 460 |
| **Toskur 2** | 2.786 | 1.936 | 1.524 | 1.714 | 2.109 | 1.468 | 1.181 | 1.617 | 1.663 | 1.407 |
| **Toskur 3** | 3.890 | 3.374 | 3.770 | 4.108 | 3.469 | 2.214 | 1.912 | 2.025 | 3.160 | 2.390 |
| **Toskur 4** | 3.501 | 2.773 | 3.759 | 4.380 | 2.581 | 1.451 | 1.422 | 1.544 | 2.414 | 1.111 |
| **Toskur 5** | 709 | 444 | 828 | 1.894 | 878 | 127 | 166 | 288 | 179 | 89 |
| **Tils.** | **11.784** | **9.400** | **10.587** | **12.787** | **10.126** | **6.229** | **5.286** | **6.189** | **8.175** | **5.663** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 6. Toskur støddarbýttur, 1. mai - 30. apríl, árini 2007-2017 (í prosentum)**

| | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 0% | 1% | 1% | 0% | 1% | 4% | 2% | 1% | 2% | 4% |
| **Toskur 1** | 7% | 8% | 6% | 5% | 9% | 12% | 9% | 10% | 7% | 8% |
| **Toskur 2** | 24% | 21% | 14% | 13% | 21% | 24% | 22% | 26% | 20% | 25% |
| **Toskur 3** | 33% | 36% | 36% | 32% | 34% | 36% | 36% | 33% | 39% | 42% |
| **Toskur 4** | 30% | 30% | 36% | 34% | 25% | 23% | 27% | 25% | 30% | 20% |
| **Toskur 5** | 6% | 5% | 8% | 15% | 9% | 2% | 3% | 5% | 2% | 2% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 7. Toskaveiðan frá 1. mai 2016 til 30. apríl 2017, býtt út á støddir og skipabólk (í tonsum)**

| | Blk. 2 (+1 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum o.a. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 56 | 71 | 25 | 4 | 29 | 3 | 16 | 3 | 0 | 207 |
| **Toskur 1** | 83 | 231 | 6 | 45 | 38 | 18 | 30 | 9 | 0 | 460 |
| **Toskur 2** | 366 | 518 | 14 | 86 | 228 | 50 | 124 | 20 | 0 | 1.407 |
| **Toskur 3** | 394 | 380 | 75 | 210 | 600 | 253 | 476 | 1 | 1 | 2.390 |
| **Toskur 4** | 99 | 122 | 44 | 116 | 219 | 164 | 346 | 0 | 0 | 1.111 |
| **Toskur 5** | 11 | 4 | 3 | 7 | 12 | 17 | 34 | 0 | 0 | 89 |
| **Tils.** | **1.010** | **1.325** | **167** | **469** | **1.126** | **505** | **1.026** | **33** | **2** | **5.663** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 8. Toskaveiðan frá 1. mai 2016 til 30. apríl 2017, býtt út á støddir og skipabólk (prosent)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4A | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 6% | 5% | 15% | 1% | 3% | 1% | 2% | 9% | 0% | 4% |
| **Toskur 1** | 8% | 17% | 4% | 10% | 3% | 4% | 3% | 27% | 0% | 8% |
| **Toskur 2** | 36% | 39% | 8% | 18% | 20% | 10% | 12% | 60% | 0% | 25% |
| **Toskur 3** | 39% | 29% | 45% | 45% | 53% | 50% | 46% | 3% | 0% | 42% |
| **Toskur 4** | 10% | 9% | 26% | 25% | 19% | 33% | 34% | 0% | 0% | 20% |
| **Toskur 5** | 1% | 0% | 2% | 2% | 1% | 3% | 3% | 0% | 0% | 2% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **0%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 9. Toskaveiðan frá 1. mai 2016 til 30. apríl 2017, prosentvísabýtið hjá hvørjum skipabólki, býtt á støddir.**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Toskur 0** | 27% | 34% | 12% | 2% | 14% | 2% | 7% | 1% | 0% | 100% |
| **Toskur 1** | 18% | 50% | 1% | 10% | 8% | 4% | 6% | 2% | 0% | 100% |
| **Toskur 2** | 26% | 37% | 1% | 6% | 16% | 4% | 9% | 1% | 0% | 100% |
| **Toskur 3** | 17% | 16% | 3% | 9% | 25% | 11% | 20% | 0% | 0% | 100% |
| **Toskur 4** | 9% | 11% | 4% | 10% | 20% | 15% | 31% | 0% | 0% | 100% |
| **Toskur 5** | 12% | 4% | 3% | 8% | 14% | 19% | 38% | 0% | 0% | 100% |
| **Tils.** | **18%** | **23%** | **3%** | **8%** | **20%** | **9%** | **18%** | **1%** | **0%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 10. Upsaveiðan 1. mai - 30. apríl árini 2007-2017, støddarbýtt (í tonsum)**

| | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 2.575 | 4.510 | 3.242 | 1.185 | 824 | 1.558 | 887 | 683 | 846 | 664 |
| **Upsi 1** | 1.557 | 1.466 | 2.064 | 1.791 | 3.033 | 2.300 | 1.770 | 1.944 | 2.501 | 1.453 |
| **Upsi 2** | 6.123 | 7.493 | 12.010 | 8.791 | 8.463 | 4.075 | 2.744 | 4.335 | 4.709 | 2.396 |
| **Upsi 3** | 26.353 | 24.931 | 25.511 | 13.978 | 7.580 | 6.897 | 10.441 | 9.281 | 6.619 | 4.670 |
| **Upsi 4** | 9.468 | 7.132 | 4.106 | 3.647 | 3.043 | 5.189 | 4.001 | 1.790 | 2.031 | 5.653 |
| **Upsi 5** | 7.000 | 7.458 | 1.891 | 2.344 | 5.977 | 7.676 | 3.241 | 1.155 | 5.607 | 8.784 |
| **Upsi 6** | 38 | 192 | 10 | 77 | 262 | 331 | 105 | 42 | 920 | 145 |
| **Tils.** | **53.114** | **53.182** | **48.834** | **31.813** | **29.180** | **28.026** | **23.189** | **19.231** | **23.233** | **23.765** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 11. Upsaveiðan 1. mai - 30. apríl árini 2007-2017, støddarbýtt (í prosentum)**

| | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 5% | 8% | 7% | 4% | 3% | 6% | 4% | 4% | 4% | 3% |
| **Upsi 1** | 3% | 3% | 4% | 6% | 10% | 8% | 8% | 10% | 11% | 6% |
| **Upsi 2** | 12% | 14% | 25% | 28% | 29% | 15% | 12% | 23% | 20% | 10% |
| **Upsi 3** | 50% | 47% | 52% | 44% | 26% | 25% | 45% | 48% | 28% | 20% |
| **Upsi 4** | 18% | 13% | 8% | 11% | 10% | 19% | 17% | 9% | 9% | 24% |
| **Upsi 5** | 13% | 14% | 4% | 7% | 20% | 27% | 14% | 6% | 24% | 37% |
| **Upsi 6** | 0% | 0% | 0% | 0% | 1% | 1% | 0% | 0% | 4% | 1% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 12. Upsaveiðan 1. mai 2016 til 30. apríl 2017, býtt út á støddir og skipabólk (í tonsum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum o.a. | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 515 | 27 | 1 | 4 | 28 | 27 | 50 | 0 | 11 | 664 |
| **Upsi 1** | 1.257 | 18 | 30 | 89 | 19 | 20 | 21 | 0 | 0 | 1.453 |
| **Upsi 2** | 2.240 | 21 | 21 | 53 | 36 | 14 | 11 | 0 | 0 | 2.396 |
| **Upsi 3** | 4.543 | 8 | 12 | 29 | 49 | 17 | 13 | 0 | 0 | 4.670 |
| **Upsi 4** | 5.523 | 1 | 6 | 9 | 74 | 8 | 31 | 0 | 0 | 5.653 |
| **Upsi 5** | 8.613 | 0 | 13 | 18 | 71 | 15 | 55 | 0 | 0 | 8.784 |
| **Upsi 6** | 140 | 0 | 0 | 0 | 4 | 0 | 1 | 0 | 0 | 145 |
| **Tils.** | **22.830** | **75** | **84** | **202** | **281** | **101** | **182** | **0** | **11** | **23.765** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 13. Upsaveiðan 1. mai 2016 til 30. apríl 2017, býtt út á støddir og skipabólk (í prosentum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Úr flotanum | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upsi 0** | 2% | 36% | 2% | 2% | 10% | 27% | 28% | 0% | 0% | 3% |
| **Upsi 1** | 6% | 24% | 36% | 44% | 7% | 20% | 11% | 0% | 0% | 6% |
| **Upsi 2** | 10% | 28% | 25% | 26% | 13% | 14% | 6% | 0% | 0% | 10% |
| **Upsi 3** | 20% | 11% | 15% | 14% | 18% | 16% | 7% | 0% | 0% | 20% |
| **Upsi 4** | 24% | 2% | 7% | 5% | 26% | 8% | 17% | 0% | 0% | 24% |
| **Upsi 5** | 38% | 0% | 15% | 9% | 25% | 14% | 30% | 0% | 0% | 37% |
| **Upsi 6** | 1% | 0% | 0% | 0% | 1% | 0% | 0% | 0% | 0% | 1% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **0%** | **0%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 14. Hýsuveiðan frá 1. mai - 30. apríl, árini 2007-2017, støddarbýtt (í tonsum)**

| | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 322 | 210 | 197 | 231 | 152 | 211 | 209 | 198 | 226 | 347 |
| **Hýsa 1** | 269 | 229 | 376 | 281 | 232 | 165 | 165 | 222 | 298 | 257 |
| **Hýsa 2** | 4.211 | 2756 | 2.947 | 2.113 | 1.609 | 1.134 | 1.364 | 1.325 | 1.547 | 1.232 |
| **Hýsa 3** | 4.081 | 1721 | 1.079 | 936 | 747 | 1.051 | 635 | 622 | 946 | 688 |
| **Hýsa 4** | 212 | 78 | 70 | 87 | 139 | 30 | 17 | 37 | 67 | 37 |
| **Hýsa 5** | 41 | 1 | 4 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tils.** | **9.136** | **4.995** | **4.673** | **3.650** | **2.879** | **2.591** | **2.390** | **2.404** | **3.084** | **2.561** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 15. Hýsuveiðan 1. mai - 30. apríl, árini 2007-2017, støddarbýtt (í prosentum)**

| | 2007/08 | 2008/09 | 2009/10 | 2010/11 | 2011/12 | 2012/13 | 2013/14 | 2014/15 | 2015/16 | 2016/2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 4% | 4% | 4% | 6% | 5% | 8% | 9% | 8% | 7% | 14% |
| **Hýsa 1** | 3% | 5% | 8% | 8% | 8% | 6% | 7% | 9% | 10% | 10% |
| **Hýsa 2** | 46% | 55% | 63% | 58% | 56% | 44% | 57% | 55% | 50% | 48% |
| **Hýsa 3** | 45% | 34% | 23% | 26% | 26% | 41% | 27% | 26% | 31% | 27% |
| **Hýsa 4** | 2% | 2% | 1% | 2% | 5% | 1% | 1% | 2% | 2% | 1% |
| **Hýsa 5** | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% | 0% |
| **Tils.** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** | **100%** |

*Kelda: VØRN*

**Talva 16. Hýsuveiðan 1. mai 2016 til 30. apríl 2017, býtt út á støddir og skipabólk (í tonsum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 270 | 21 | 39 | 0 | 8 | 0 | 8 | 0 | **347** |
| **Hýsa 1** | 44 | 86 | 12 | 43 | 17 | 39 | 17 | 0 | **257** |
| **Hýsa 2** | 55 | 379 | 75 | 317 | 137 | 171 | 97 | 1 | **1.232** |
| **Hýsa 3** | 42 | 134 | 55 | 167 | 76 | 133 | 81 | 0 | **688** |
| **Hýsa 4** | 3 | 3 | 4 | 9 | 4 | 9 | 6 | 0 | **37** |
| **Tils.** | **414** | **623** | **185** | **536** | **242** | **352** | **208** | **1** | **2.561** |

*Kelda: VØRNViðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

**Talva 17. Hýsuveiðan 1. mai 2016 til 30. apríl 2017, býtt út á støddir og skipabólk (í prosentum)**

| | Blk. 2 | Blk. 3 | Blk. 4 | Blk. 4B | Blk. 4T | Blk. 5A | Blk. 5B | Garna-skip | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hýsa 0** | 65% | 3% | 21% | 0% | 3% | 0% | 4% | 0% | **14%** |
| **Hýsa 1** | 11% | 14% | 6% | 8% | 7% | 11% | 8% | 0% | **10%** |
| **Hýsa 2** | 13% | 61% | 41% | 59% | 57% | 49% | 47% | 0% | **48%** |
| **Hýsa 3** | 10% | 21% | 30% | 31% | 32% | 38% | 39% | 0% | **27%** |
| **Hýsa 4** | 1% | 1% | 2% | 2% | 2% | 3% | 3% | 0% | **1%** |
| **Tils.** | 65% | 3% | 21% | 0% | 3% | 0% | 4% | 0% | **14%** |

*Kelda: VØRN*

*Viðmerking: Bólkur 1, lemmatrolarar, varð lagdur saman við bólk 2 pr. 1. sept. 2011.*

## Skjal 1. Frágreiðingin: Samrøðukanning millum fiskimenn 2017

Frágreiðingin er hjáløgd sum sjálvstøðugt skjal.